**Kári P. Højgaard**
**løgtingsmaður**

**Nr. 50/2018**

**Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a**

**Fyrispurningur um út- og nýbyggingina á Landssjúkrahúsinum, settur landsstýrismanninum í heilsumálum Sirið Stenberg (at svara skrivliga eftir TS § 52a)**

1. Hvørji stig eru tikin í út-og nýbyggingini av Landsjúkrahúsinum til tess at tryggja, at bert grøn, umhvørvisvinarlig og varandi orka verður nýtt til upphiting.
2. Er tað rætt sum mær er komið fyri oyra, at reinsiverkið á Sjúkrahúsinum er burturbeint og spillivatn sostatt rennur óreinsað á sjógv.

**Viðmerkingar:**
Føroyar hava sett sær sum mál, at minka útlátið av CO2 og øðrum dálkandi evnum við 20 prosentum í 2020 í mun til 2005.

SEV hevur vunnið Umhvørvisvirðisløn Norðurlandaráðsins grundað á ætlanina, at í 2030 skal øll framleiðsluorka á landi í Føroyum, verða frá varandi umhvørvisvinarligum grønum orkukeldum.

Landstýriskvinnan hevur ovastu politisku ábyrgdina á umhvørvisøkinum og sjúkrahúsverkinum. Her er talan er um eina risastóra alneyðuga verkætlan, sum umhvørvisliga skuldi verðið eitt gott fyridømi fyri alla almenna bygging.

Fyri at fáa staðfest, um byggingin livir upp til politisku málini, verður spurningurin settur landstýriskvinnuni.

**Á Løgtingi, 11. februar 2019**

Kári P. Højgaard